

*Lagaligar løtur vóru ikki nógvar hjá einum manni sum var mynstraður yvir 300 dagar um árið í eitt 15 ára skeið frá 1958 til 1964. Her er ein mynd á trolaradekki og ein á ferð uttanlands saman við konuni.*

# Myndir til ævisøguna um Kaj

## "Næráberg", "Dragaberg", "Sjúrðarberg"

Tað hevur gingist væl við innsavnanini av myndum, serliga nógvar eru komnar frá tí fyrsta og tí týska "Skálabergi". Tunnligt er tó enn við myndum frá "Nærábergi", "Dragabergi" og "Sjúrðabergi".

Onnur bókin, í ævisøguni um Kaj Johannesen úr Hvannasundi, verður nú skrivað, og kemur, um alt gongur eftir vild, út í heyst. Hon fer serliga at snúgva seg um krígsárini við Skálabergi og Nærabergi. Tíðina umborð á Dragabergi, Sjúrðarbergi og týska Skálabergi.

Í hesum sambandi sóknast høvundurin eftir myndum frá æviskeiði hansara. Í fyrstu atløgu hava allar myndir, sum hava nakað við virki og lív hansara áhuga. Tað verið seg myndir umborð á skipi, ikki bara myndir av Kaj, men eisini av lívinum umborð. Myndir av monnum, sum sigldu við Kaj hava áhuga og eisini myndir umborð á trolarum, sum brøður hansara førdu. Eg havi eisini áhuga fyri myndum tiknum umborð á øðrum trolarum, av føroyskum trolarum undir fiskiskapi. Gerandismyndir av arbeiðsgevaranum hjá Kaj, J. F. Kjølbro, hava stóran áhuga.

Liggja tit inni við slíkum myndum, so hevði eg verið ógvuliga fegin, um tit settu tykkum í samband við meg.

**vinarliga**
Jústinus Leivsson Eidesgaard,
*rithøvundur*

**Eftirlýsing:** Einaferð Kaj hevði frítúr, avgjørdi manningin á "Sjurðarberg" at teir skuldu hjálpa tí unga stýrimanninum, Martin Sivertsen, at sláa metið fyri skjótan túr. Teir strevaðust heilt út av nálinini og tað eydnaðist. Túrurin hevur verið miðskeiðis í fimtiárunum og teir royndu eystanfyri. Veit nakar at siga frá hesum túri?

**KAJ2**
Ein dokumentarisk ævisøga

**Forlagið Hellurnar**
v/Jústinus Leivsson Eidesgaard
Ovaragøta 1 · 188 Hoyvík
Tel. 22 31 43 · justinus@post.olivant.fo

FØROYAPRENT - TEL. 314 555

## Tvingsilssøla

**Fríggjadagin 12. august 2005, kl. 14.00** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina **matr. nr. 212, Kirkjubøur.** (AS nr. 2-24/2005)

Sambært tryggingarskjalinum er talan um eini sethús, og er bygda økið 52 kvm. Sambært tingbóksattestini er økið húsini standa á til víddar 606 kvm.

Húsini eru innrættað soleiðis:

Kjallarahæddin: Kjallarin er óinnrættaður, har lágt er til loftið, umframt at hann er ikki undir øllum húsinum.

Miðhædd: gongd, wc við brúsu, uppgongd til loftið, stova og køkur.

Loft: Á loftinum er gongd og trý kømur.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, Tórshavn, tlf. 311260, (j. nr. 4010402)**, sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssølan kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

Føroya Fútarættur,
tann *27. juni 2005*

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

# Skrivari til Viðareiðis Kommunu

Viðareiðis Kommuna søkir hervið eftir skrivara, at byrja 1. august 2005.

**Av uppgávum kunnu m.a. nevnast:**

- Hava kommunuskrivstovuna opna ein dag um vikuna
- Bókhald kommunurnar
- journalisering og fólkayvirlit
- Er skrivari á kommunustýrisfundum
- Tekur sær av øllum vanligum skrivstovuarbeiði
- Ymiskar aðrar uppgávur

Arbeiðstíðin verður fyribils 10 tímar/viku.

Løn sambært avtalu.

Møguligar umsóknir skulu vera kommunustýrinum í hendi innan 15. juli 2005.

Meir fæst at vita um skrivarastarvið við at venda sær til borgarstjóran.

**Viðareiðis Kommuna**
FO-750 Viðareiði

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3965**
**Navn:** Sp/f 31.maj 2005
**Adressa:** 370 Miðvágur
**Kommuna:** Miðvágs
**Stovningardato:** 31-05-2006
**Viðtøkudato:** 31-05-2006
**Stovnarar:**
P/F 278, P/F Vatnsoyrar Snikkaravirki , 385 Vatnsoyrar
Hans Oddmar Ravnsfjall, 370 Miðvágur
Rólant Haraldsen, 370 Miðvágur
**Nevnd:**
Hans Oddmar Ravnsfjall, 370 Miðvágur, (nevndarformaður)
Rólant Haraldsen, 370 Miðvágur, (nevndarlimur)
Heðin Poulsen, 385 Vatnsoyrar, (nevndarlimur)
**Stjórn:**
Heðin Poulsen, 385 Vatnsoyrar, (stjóri)
**Grannskoðari:**
P/F Grannskoðaravirkið Inpact, statsaut. revisorar, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn
**Partapeningur:** kr. 90.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 90.000,00 til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum ella nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handilsvirksemi og útleigan í Vágum og annað starv í hesum sambandi.
**Rokniskaparár:** 01.01 - 31.12
**Fyrsta rokniskaparár:**
31.05.2006 - 31.12.2005

Skráseting Føroya
tann 27. juni 2005

Kristin Balle

www.sosialurin.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3981**
**Navn:** Sp/f Joka
**Adressa:** Tjóðhildargøta 6 100 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar
**Stovningardato:** 09-05-2006
**Viðtøkudato:** 09-05-2006
**Stovnarar:**
Kári Thomassen, Grønlandsvegur 68, 100 Tórshavn
Johnny Thomassen, Tjóðhildargøta 6, 100 Tórshavn
**Stjórn:**
Johnny Thomassen, Tjóðhildargøta 6, 100 Tórshavn, (stjóri)
**Grannskoðari:**
Óli Regin Hansen skrásettur grannskoðari, Tróndargøta 39, 100 Tórshavn
**Partapeningur:** kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga og reka fasta ogn og annað virksemi í hesum sambandi.
**Rokniskaparár:** 01.01 - 31.12
**Fyrsta rokniskaparár:**
09.05.2005 - 31.12.2005

Skráseting Føroya
tann 27. juni 2005

Kristin Balle

**1-ÁRIGT BASISKURSUS I MISBRUGSBEHANDLING**

*Gjáargarður, Gjógv - Start august 2005*
***Endnu 4 ledige pladser***

*For information kontakt:*
*Martin Kúrberg, Eiði 423529*
*Jesper Grubach, Danmark 0045-74585111*

**Institut for Misbrugsbehandling og Pskykoterapi, Danmark**
**www.misbrugsdannelsen.dk**

Sosialurin 341800

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

**Stilladsútgerð og forskallingsútgerð**
HÜNNEBECK
**Til keyps og leigu:**
- Fasadustilladds
- Rullustillads
- Aluminiumstillads
- Forskallingar - Nógv sløg!
- Forskallingsútgerð: Forskallingsoljur, sproytur, klams, konus, avstandsrør, binditráður, bindimaksinur, fuguband, stoypibats/isolering, armeringsjarn o.a.

Leverandørurin til byggi-entreprenørvinnuna síðan 1970!

Sosialurin 341800



Lesið Sosialin - so eru tit við